## Kompany leingir við City

Belgiski Vincent Kompany hevur skrivað undir nýggjan sáttmála, sum bindur verjuspælaran at Manchester City fram til 2014. Kompany kom til City í fjør, og seinastu tíðina hevur ljóðað, at eitt nú Barcelona var áhugað í at keypa spælaran, men leiðslan í Manchester City slær nú fast, at hetta verður av ongum.



## Liverpool keyp helst av ongum

Seinastu tíðina hevur ljóðað, at eitt saudi-arabiskt íløgufelag er væl ávegis í royndunum at keypa enska Liverpool. Men varastjórin í F6, sum felagið eitur, sigur nú, at lítið er um tosið um, at teir seinastu vikuna hava samráðst um eitt keyp. – Vit hugsaðu um hetta í september mánaði, men síðani tá er einki sum helst hent, sigur Gassim Hamidaddin, varastjóri í F6. George Gillet, sum er annar av eigarunum av Liverpool, hevur annars júst verið í Saudi-Arabia, og hetta setti sum vera man gongd á gitingarnar í ensku miðlunum.

# Viðarlundina



Høgni Øster er higartil einasti fjallasúkklarin, sum hevur umboðað Føroyar á Oyggjaleikum



Andrass Joensen megnaði frægast at hanga í Gunnari Dahl Olsen í Viðarlundini

### Ein fjalla-súkklari

Higartil er Høgni Øster einasti føroyingurin, sum hevur luttikið á Oyggjaleikum í fjallasúkkling, og hann hevur sítt boð uppá, hvussu mann verður ein góður fjallasúkklari.

- Fyrst skal mann hava dirvi, so kemur eitt sindur av teknikki og so er 80 prosent kondi, staðfestir hann.

Gunnar Dahl Olsen, sum vit best kenna frá »vanligari« súkkling, vann kappingina í fjallasúkkling, men Høgni Øster er ikki heilt vísur í, at vinnandi vetaranurin er besti fjallasúkklarin reint tekniskt.

- Konditiónin spælir nokk mest inn í dag. Men tað hjálpir sjálvandi Gunnari, at hann hevur súkklað so leingi, og hevur nógvar royndir. Hann hevur grundformin og tað er nokk tað, hann vinnur uppá, staðfestir Høgni Øster, sum eisini heldur, at fjallasúkkling spakuliga byrjar at koma fyri seg í Føroyum.

-eij

## Roknaði við at vinna

Eg hevði logið, um eg segði, at eg ikki roknaði við at vinna.

Hetta staðfestir Gunnar Dahl Olsen, nú hann bæði fyri nøkrum vikum síðan vann Cross Country teinin og leygardagin vann Criterium teinin í fjallasúkkling. Og tí er dupultur Føroyameistari í fjallasúkkling.

Men hóast hann roknaði við sigrinum, so fegnast hann.

- Hetta gevur eina fantastiska kenslu. At sleppa at súkkla her í Viðarlundini eftir hesum teininum í nærum stilli. Tað er fantastiskt, staðfesti Gunnar Dahl Olsen beint eftir kappingina.

Hinvegin er hann ikki vísur í, at hann tekniskt er besti súkklarin.

- Eg síggi væl, at tá tað verður tekniskt, so er ungi Sigmund Olsson nógv sterkari enn eg, og so má eg vinna inn á longur teinunum, greiddi Gunnar Dahl Olsen frá, sum vónar, at tað aftur verður súkklað í Viðarlundini.

**-eij**

### Úrslit hjá vaksnum

1. Gunnar Dahl Olsen, 48:05 um 10 umgangir.
2. Andrass Joensen, 49:59 um 10 umgangir.
3. Høgni Øster, 52:37 um 10 umgangir.
4. Sigmund Olsson, 50:18 um 9 umgangir.
5. Sverri Edvinsson, 52:36 um 9 umgangir.
6. Evald Rasmussen, 52:29 um 9 umgangir.
7. Kári Simonsen, 50:13 um 8 umgangir.
8. Henry Berg, 50:34 um 7 umgangir.



Teinurin, ið varð súkklaður í Viðarlundini var 1,4 kilometrar. Upp á umleið 48 minuttir megnaði Gunnar Dahl Olsen at súkkla hann 10 ferðir

## Børnini kappaðust eisini



Tá teir vaksnu vóru lidnir at súkkla, traðkaðu tey ungu á pedalirnar í Viðarlundini

Tá teir vaksnu súkklararnir vóru lidnir at súkkla sluppu børnini framat gøtunum í Viðarlundini. Kappast var í seks ymiskum bólkum hjá teimum. Fýra aldursbólkar vóru, og dreingir vóru í øllum trimum bólkunum. Hjá gentunum var tað somuleiðis í trimum bólkum, at umboðan var.
Úrslitini vóru hesi.

**Gentur:**
9-11 ár:
1. Durita Joensen
12-14 ár¬:
1. Marta Olsson
2. Maria Olsson
15-17 ár:
1. Sanna Olsson
2. Bjørg J. Poulsen

**Dreingir:**
6-8 ár:
1. Regin M. Gaard
9-11 ár:
1. Tummas Simonsen
2. Bartal Gregoriussen
3. Poul Johan á Torvlagnum
4. Karl Martin Olsen
5. Tóki B. Poulsen
6. Bjørn A. Bjarnason
12-14 ár:
1. Patrick Larsen
2. Mortan Johannesen
3. Benjamin Thomassen
4. Hjørtur B. Poulsen
5. Edmundur W. Johannesen